Tryggingareftirlitið

Til móttakaran á viðfesta yvirliti

**Tórshavn 17. desember 2013**
Journalnr.: 13/01006-3

**Hoyringarskriv**

**Uppskot til kunngerð um grannskoðan av tryggingarfeløgum og fíggjarligurm haldfelagsskapum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum viðfesta *Uppskot til kunngerð um grannskoðan av tryggingarfeløgum og fíggjarligum haldfelagsskapum* til hoyringar.

Uppskotið hevur, eins og verandi grannskoðanarkunngerð, 2 høvuðsendamál:

1. at nágreina hvørjar serstakar upplýsingar og niðurstøður eksterna grannskoðanin skal umrøða í grannskoðanarprotokollini til nevndina í sambandi við grannskoðan av ársroknskapinum
2. at nágreina arbeiðið hjá eini innanhýsis grannskoðan bæði mótvegis tryggingarfelagnum og eksternu grannskoðanini

Stórsta einstaka broytingin er, at í § 3 í uppskotinum verður víst til eitt nýtt fylgiskjal (nr. 2) við heitinum "Beskrivelse af revisors arbejdshandlinger". Hini 3 fylgiskjølini eru at kalla tey somu sum í verandi kunngerð.

Ásetingarnar í uppskotinum viðvíkjandi internu grannskoðanini eru at kalla óbroyttar í mun til verandi kunngerð.

Endamálið við nýggja fylgiskjalinum er at nágreina grannskoðanararbeiðið aftanfyri tær niðurstøður og upplýsingar, sum álagt er eksternu grannskoðanini at umrøða í grannskoðanarprotokollini til nevndina sambært §§ 7-14 og §§ 33 og 34. M.a. verður grannskoðanarbeiðið viðv. eftirkannan av innanhýsis mannagongdum meira beinleiðis tengt at teimum krøvum, sum ásett eru í nýggju leiðslukunngerðini (kunngerð nr. 1 frá 16. januar 2013 um leiðslu og stýring av tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum), og víst verður eisini til viðkomandi altjóða grannskoðanarstandardar (ISA).

Sambært § 6 í uppskotinum kunnu umrøddu niðurstøður og upplýsingar latast nevndini í einari serligari grannskoðanarprotokol við heitinum: "Grannskoðanarprotokol viðvíkjandi serstøkum krøvum frá Tryggingareftirlitinum til grannskoðanina av ársroknskapinum."

Tær kravdu upplýsingar og niðurstøður, sum eksterna grannskoðanin skal taka við í grannskoðanarprotokollina sambært §§ 7-14 í uppskotinum, eru at kalla tær somu, sum eru ásettar í §§ 5 og 6 í verandi kunngerð.

Sambært uppskotinum skal orðið "niðurstøða" (konklusion) verða nýtt í grannskoðanarprotokollini í framtíðini í staðin fyri "váttan" (erklæring), eftirsum talan ikki er um eina "váttan" mótvegis triðjamanni, soleiðis, sum hetta hugtak m.a. er lýst í kunngerðini um grannskoðanarváttanir v.m. (erklæringsbekendtgørelsen).

Sambært § 7, stk. 2 og 3 í uppskotinum verður álagt eksternu grannskoðanini at umrøða boð og tilmæli frá Tryggingareftirlitinum í serstøkum parti av grannskoðanarprotokollini og taka støðu til, um hesi eru fylgd.

Uppskotið til nýggja grannskoðanarkunngerð er meinlíkt samsvarandi kunngerð frá danska Fíggjareftirlitinum, tá ræður um tann partin, sum fevnir um tryggingarfeløg. Nýggjasta danska kunngerðin, nr. 1024 frá 24. august 2013. - Danska Fíggjareftirlitið, FSR–Danske Revisorer og foreningen af interne revisorer (IIA) arbeiddu saman um at dagføra kunngerðina, sum varð send til hoyringar 27. maj 2013, hoyringarskrivið er viðfest til kunningar.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu latast Tryggingareftirlitnum í seinasta lagi mánadagin 27. januar 2014. Viðmerkingar kunnu sendast við telduposti til lh@tryggingareftirlitid.fo ella við posti til Tryggingareftirlitið, Skálatrøð 20, FO 100 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Leivur Harryson